


# MENNINGAR-ÆTLANIN

2021-2026


BAKKAFROST
SALMON
from the Faroe Islands




INNIHALDSYVIRLIT

04 FÓTBÓLTUR FYRI ØLL - ALT ÁRIÐ - ALT LÍVIÐ

06 VISJÓN, MISSIÓN OG VIRÐINI

10 MENNINGARÆTLANIN 2021-2026

12 HØVUÐSMÁLINI KOMANDI ÁRINI

# FÓTBÓLTUR FYRI ØLL
# – ALT ÁRIÐ – ALT LÍVIÐ




Fleiri føroyingar skulu gerast partur av føroyskum fótbólti. Tað er greiða og heilt ítøkiliga málið, sum vit í Fótbóltssambandi Føroya hava sett okkum komandi fimm árini. Vit vilja halda á við at stimbra og styrkja føroyskan fótbólt. Og skal tað eydnast – ja, so skulu vit hava enn fleiri við.

Í føroysku fótbóltsfamiljuni er pláss fyri øllum. Fyri alspenta áskoðar-anum. Fyri hjálpsamum fyritøkum og kommunum. Og fyri foreldrum, sum selja kaffi og køkur til dystir í fremstu deildunum.

Fótbóltstjóðin Føroyar skal tora at seta sær stór mál: Á vøllinum, á skrivstovunum hjá feløgunum og í fyrisitingini. Í bæði breiddini og úrval.

Okkara mál fram til 2026 er at gera Føroyar til heimsmeistarar – í luttøku.

Tað skal verða lætt hjá øllum at spæla fótbólt - uttan mun til aldur, kyn, førleikar ella hvar tú býrt í landinum. Fíggjarliga orkan hjá einari familju eigur heldur ikki forða fyri, at børn sleppa at spæla fótbólt.

Vit vilja hava enn fleiri børn, ungdómar, vaksin og eldri at spæla fótbólt. Og tey, sum longu spæla, vilja vit hava at spæla so leingi sum møguligt. Tað skal vera gjørligt hjá øllum at spæla fótbólt út frá egnum støði og tørvi. Tað merkir, at vit skulu geva øllum møguleikan at velja, um tey vilja kappast ella brúka spennandi fótbóltspælið til at røra seg alt árið.

Feløgini eru hjartaslátturin í føroyskum fótbólti. Tey liva og leiða fótbólt alt árið. Uttan teirra ótroyttiliga arbeiði fáa vit ikki fleiri at spæla fótbólt. Saman við feløgunum skulu vit tí áhaldandi styrkja og menna feløgini, so teirra gerandisdagur gerst einfaldari og lættari. Feløgini hava ein lyklaleiklut í mun til at menna fótbóltsspælið, spælarar og venjarar.

Sjálvbodna arbeiðið úti í feløgunum kann ikki undirmetast. Grundarlagið undir føroyskum fótbólti hvílir í stóran mun á øllum teimum, sum hjálpa til - á og uttan fyri vøllin. Sjálvbodna arbeiðið er sterkt í Føroyum, men tað er eisini undir trýsti. Tað sjálvbodna arbeiðið er ikki so sjálvboðið, sum tað einaferð var, og hesi sannroynd eiga vit í Fótbóltssambandi Føroya at leggja uppfyri.

Føroyskur fótbóltur hevur ein stóran leiklut í føroyska samfelagnum. Eina stóra ábyrgd. Vit gera okkara fyri fólkaheilsuni og rørsluni hjá føroyinginum. Vit birta undir góð sambond og vinaløg. Og okkara úrslit eru við til at kveikja ein tjóðskaparstoltleika.

Í Føroyum hava vit ein góðan ítróttaranda. Einum ítróttaranda, sum borgar fyri virðing, tryggleika og samanhaldi. Fyri gleði, trivnaði og felagsskapi.

Og nú vilja vit styrkja felagsskapin við at fáa enn fleiri at gerast partur av føroyskum fótbólti. Men vit røkka ikki hesum máli einsamøll. Saman við feløgunum, áskoðararum, øðrum ítróttagreinum, kommunum, fjølmiðlum og fyritøkum kunnu vit røkka hesum máli í felag.

Eg eri bjartskygdur. Við neyðugum nærlagni og eldhuga skulu vit gera okkara til at røkka okkara málum. Tað er mín sterka vón fyri tey komandi fimm árini.

**Christian F. Andreasen**
Forseti í FSF

# VISJÓN, MISSIÓN OG VIRÐINI

## VISJÓN

**Føroyar skulu gerast heimsmeistarar – í luttøku**

So nógv sum møguligt skulu taka lut í føroyskum fótbólti. So leingi sum møguligt. Og undir so góðum kørmum sum møguligt. Okkara ítøkiliga mál er, at 20 prosent fleiri leggjast afturat komandi fimm árini.

## MISSIÓN

**Vit stimbra, styrkja og standa á odda fyri føroyskum fótbólti**

Fótbóltssambandið gongur á odda við at lyfta føroyskan fótbólt fram á leið. Vit vilja altíð veita eina góða tænastu, og støðugt leggja vit okkum eftir at hava ta bestu fakligu vitanina á okkara arbeiðsøkjum.











# VIRÐINI

Fótbóltssamband Føroya røkir sínar uppgávur við støði í hesum virðum:

**Nærlagni**
Vit stremba altíð eftir at gerast uppaftur betri. Vit seta okkum sjálvum høg krøv, og vit seta dygd og dugnasemi høgt. Við nærlagni arbeiða vit miðvíst móti at røkka okkara málum.

**Eldhugi**
Vit elska fótbólt í øllum lutum. Vit liva og anda fyri fótbólti. Hvønn einasta dag vilja vit gera føroyskan fótbólt eitt sindur betri, enn hann var í gjár. Okkara eldhugi er eins stórur at menna barnafótbólt sum at lyfta føroyskan landsliðsfótbólt. Vit hava ein brennandi hug bæði at betra og at vísa fram spælið, so enn fleiri kunnu leggjast afturat føroysku fótbóltsfamiljuni.

**Ítróttarandi**
Vit eru her fyri hvørannan. Vit lyfta sum eitt lið og vísa virðing – eisini fyri øllum teimum, sum ikki eru líka sum vit. Vit standa saman, og vinna og tapa sum eitt lið. Tað gera vit innanhýsis í Fótbóltssambandi Føroya, tað gera vit saman við feløgunum og tað gera vit eisini saman við øllum Føroyum.

# MENNINGARÆTLANIN **2021-2026**

Nýggja menningarætlanin hjá Fótbóltssambandi Føroyar er orðað í samstarvi við føroysku fótbóltsfamiljuna. Vitanin og royndirnar hjá limafeløgunum, starvsnevndarlimum og starvsfólkum hjá FSF hevur verið kærkomin í arbeiðinum seinastu mánaðirnar. Fakliga íslettið frá Evropeisku fótbóltssamgonguni UEFA hevur eisini verið ein góð hjálp.

Menningarætlanin fyri 2021 til 2026 byggir á herðarnar á undanfarnu menningarætlan. At Fótbóltssamband Føroya hevur valt at seta sær nøkur høvuðsmál komandi fimm árini, merkir ikki, at onnur øki standa órørd. Als ikki. Tað er ein orsøk til, at eitt nú landsliðsarbeiðið og fysisku karmarnir ikki fylla so nógv í hesari menningarætlanini. Bæði øki vórðu raðfest ovarliga í seinastu menningarætlanini, og meðan fakligu førleikarnir kring landsliðsarbeiðið eru styrktir munandi, gleða vit okkum til landsdystin móti Íslandi tann 4. juni 2021 á einum nýmótans og útbygdum Tórsvølli.

Nýggja menningarætlanin stingur út kósina fyri føroyskan fótbólt komandi fimm árini. Høvuðsmálini komandi árini verða:

**MENNA FELØGINI**

**GRASSROOTS**

**ÚTBÚGVING OG ÚRVAL**

**KVINNUR OG GENTUR Í FÓTBÓLTI**

**MARKNAÐARFØRING OG SAMSKIFTI**


HØGNASON

HØVUÐSMÁLINI KOMANDI ÁRINI

# 1

# MENNA FELØGINI

Feløgini eru hjartaslátturin í føroyskum fótbólti. Vit vilja áhaldandi styrkja fyrisitingina hjá feløgunum við at skipa fyri fakligum skeiðum og íblástri. Ein nýggj skipan við FSF klubbmennararum verður sett í verk. Eisini fara feløgini sjálvi undir eina tilgongd at orða sína egnu menningarætlan.












# 2

# GRASSROOTS

Føroyar eru millum tey fremstu í heiminum í grassrootsfótbólti. Tað skulu vit framhaldandi vera – og ikki halda okkum aftur at stremba enn hægri. Vit fara tí at eftirhyggja verandi kappingarleist við tí fyri eyga at fáa enn fleiri at spæla fótbólt. Bóltur og spæl verkætlanin, har skúlar og barnagarðar spæla fótbólt, skal setast fult í verk. Eisini miða vit eftir, at bróðurparturin av øllum ungdómsvenjararum í Føroyum hevur UEFA C venjaraskeið.

# 3

# ÚTBÚGVING OG ÚRVAL

Skal føroyskur fótbóltur taka neyðugu fetini fram á leið, er neyðugt at raðfesta útbúgving og úrval. Tað merkir, at Fótbóltssamband Føroya støðugt og miðvíst tillagar allar útbúgvingarnar, so at tær samsvara við nýggjastu broytingarnar hjá UEFA. Fyri at styrkja um vitanarstøðið í føroyskum fótbólti verður ein nýggj greiningar- og avriksdeild sett á stovn.





# 4

# KVINNUR OG GENTUR Í FÓTBÓLTI

Arbeiðið við at menna kvinnu- og gentufótbólt heldur fram. Tað verður virkað miðvíst fyri at fáa fleiri gentur og kvinnur at spæla fótbólt – bæði á breiddarstigi og úrval. Heilt ítøkiliga málið er, at talið av leikararum í kvinnu- og gentufótbólti tvífaldast komandi fimm árini. Fyri at tryggja eitt munagott venjingartilboð til kvinnur og gentur, verður áherðsla løgd á at fáa fleiri kvinnur at gerast venjarar. Eisini er málið at fáa fleiri kvinnuligar dómarar, og fleiri kvinnur skulu gerast partur av nevndararbeiðinum hjá limafeløgunum.






TN BYGGING
STEYPAFINALAN2019





# 5

# MARKNAÐAR-FØRING OG SAMSKIFTI

Tað skal verða møguligt hjá øllum – nær og fjar – at fylgja við, hvat rørir seg í føroyskum fótbólti. Fyrsta stig var at styðja undir, at allir dystir í bestu mansdeildini kundu stroymast. Nú verður miðað eftir, at allir dystir í bestu kvinnudeildini eisini kunnu stroymast. Fyri at stimbra og styrkja marknaðarføringina og samskiftið hjá Fótbóltssambandi Føroya, verður ein nýggj samskiftisætlan orðað fyri komandi árini.

## MÁL 1 | MENNA FELØGINI

| DEILMÁL | MÁLIAMBOÐ/KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| Dagligur leiðari setast í starv í øllum feløgum | - Øll 18 feløgini hava sett dagligan leiðara í starv – fulla tíð ella parttíð | 31. desember 2023 |
| Skipa reglulig skeið fyri fyrisitingarpersónar í feløgunum | - Í minsta lagi trý skeið árliga | 31. desember 2025 |
| Mentorskipan fyri dagligar leiðarar í fótbóltsfeløgunum setast í verk | - Nýggjur í nevnd | 31. desember 2022 |
| Øll fótbóltsfeløg skulu hava egna menningarætlan | - Fótbóltsfyrisiting | 31. desember 2023 |
| SROI (Social Return on Investment) kanning fyri øll feløg | - Fótbóltsleiðsla | 30. juni 2022 |
| Árlig nøgdsemis-kanning millum feløgini við kappingarlok | - Fyrsta nøgdsemiskanning gerast eftir kappingarlok 2021<br>- NPS úrslit á 50 ella hægri í nøgdsemiskanning millum feløgini | 31. des. 2021-25<br>31. des. 2021-25 |

## MÁL 2 | GRASSROOTS

| DEILMÁL | MÁLIAMBOÐ/KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| 90% av øllum venja-rarum hjá barna- og ungdómsliðum hava UEFA C-prógv | 90% av øllum venjararum hjá barna- og ungdóms-liðum hava UEFA C-prógv (310 lið) | 31. desember 2025 |
| Bóltur og spæl verkætlan (skúla- og barnagarðsfótbóltur 5-8 ár) setast í verk | - 2022: 150 børn luttaka<br>- 2023: 300 børn luttaka<br>- 2024: 450 børn luttaka | 30. juni 2024 |
| Dagføra FSF Grassroots filosofiina | - Dagførd Grassroots filosofi samtykt av Grassrootsnevndini<br>- 6.200 skrásettir leikarar | 31. desember 2021<br>31. desember 2025 |
| Nýggj kappingar-filosofi fyri føroyskan fótbólt | - Nýggj kappingarfilosofi leggjast fyri avvarandi nevnd innan árslok 2022 | 31. desember 2022 |
| Dagførd og neyv hag-tøl fyri grassrootsvirk-semið í Føroyum – tal av leikararum, liðum, venjararum o.s.fr. | - Framleiða fyrstu hagtals-frágreiðingina um grass-roots virksemið í Føroyum.<br>– Árlig hagtalsfrágreiðing skrivað | 31. desember 2021<br>31. des. 2022-25 |




BOV

## MÁL 3 | ÚTBÚGVING OG ÚRVAL

| DEILMÁL | MÁLIAMBOÐ/KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| Gera eina rekrutteringsstrategi til ávísar málbólkar (t.d. spælarar) innan venjaraútb. | Rekrutteringsstrategi samtykt av útbúgvingar- og menningarnevnd | 31. desember 2022 |
| Liva upp til krøvini í UEFA Coaching Convention | - Røkka UEFA Gold stigi | 31. desember 2023 |
| Framleiða føroyskt tilfar til C og B venjaraútbúgvingarnar | - Útbúgvingartilfar góðkent av útbúgvingar- og menningarnevnd | 31. desember 2024 |
| Gera FSF leikháttin lidnan og verkseta leikháttin í yngru landsliðini | - FSF leikhátturin tikin í nýtslu á øllum landsliðum | 31. mars 2025 |
| Menna ítróttarliga greiningar- og avriksdeild | - Avriksdeild sett á stovn við nøktandi starvsfólki<br>- Greiningarútgerð keypt og tikin í nýtslu | 31. desember 2025 |

## MÁL 4 | KVINNUR OG GENTUR Í FÓTBÓLTI

| DEILMÁL | MÁLIAMBOÐ/KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| Menna kvinnulandsliðini | - Seta í starv fulltíðar venjara til landsliðið hjá kvinnum<br>- Gera og seta í verk megin reglur fyri fysisku egin-leikarnar hjá leikararum á kvinnulandsliðnum | 31. desember 2021<br>31. desember 2025 |
| Vaksa luttøku á kvinnusíðuni við 100% | - 3.138 skrásettir leikarar hjá gentum og kvinnum | 31. desember 2025 |
| Útbúgva fleiri kvinnuligar venjarar við UEFA A og B prógvi og skipa árlig serskeið fyri kvinnu-venjarar | - Tveir kvinnuligir venjarar við UEFA prógvi og 18 við UEFA B prógvi<br>- Skipa árligt venjaraskeið fyri kvinnuligar venjarar | 31. desember 2023<br>31. desember 2025 |
| Dómaraleið fyri kvinnuligar dómarar | - 12 kvinnuligir dómarar við FSF útbúgving | 31. desember 2024 |
| Fleiri kvinnur í nevnd og fyrisiting hjá feløgunum | - 20% av nevndarlimum í feløgum skulu vera kvinnur<br>- FSF skipar fyri árligum leiðara tiltaki fyri kvinnu-ligar leiðarar í feløgunum | 31. desember 2024<br>31. desember 2025 |

## MÁL 5 | MARKNAÐARFØRING OG SAMSKIFTI

| DEILMÁL | MÁLIAMBOÐ/KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| Stroyma allar dystir í bestu deildini hjá kvinnum | - Í 2021 verður í minsta lagi ein dystur stroymdur beinleiðis hvørt umfar í bestu kvinnudeildini<br>- Í 2025 verða allir dystir í bestu kvinnudeildini stroymdir beinleiðis | 31. desember 2025 |
| Nýggjur høvuðsstuðul fyri føroyskan grassrootsfótbólt | Sáttmáli undirskrivaður innan árslok 2025 | 31. desember 2025 |
| Gera samskiftisætlan fyri tíðarskeiðið 2021-2025 | - Samskiftisætlan leggjast fyri avvarandi nevnd<br>- NPS úrslit á 50 ella hægri í nøgdsemiskanning millum áskoðarar | 31. desember 2021<br>31. desember 2025 |
| Sundurskilja og lýsa ymisku brandini hjá FSF | - Nýggj brandstrategi leggjast fyri avvarandi nevnd innan árslok 2022 | 31. desember 2022 |
| Dátugreining gerast grundarlag fyri marknaðarførings- og samskiftisavgerðum. Greiningarforrit, ið savnar og greinar verandi dátugrunnar, skal mennast og setast í verk | - Fótbóltssambandið skal skipa egnar dátugrunnar og -keldur, so at hesar kunnu gagnnýtast í sambandi við marknaðarføring og samskifti innan árslok 2023 | 31. desember 2023 |








**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA**
Gundadalur | Postrúm 3028 | FO-110 Tórshavn
Telefon 351979
fsf@football.fo | www.fsf.fo

GROW